# Álit um ung handað Tórshavnar Býráð

**Eftir at hava kannað hvussu trivnaðurin og umstøðurnar eru hjá børnum og ungum í Havn læt ein arbeiðsbólkur í gjár úr honfum nýtt álit um hesi viðurskifti. 499 ungfólk hava svarað spurningum um, hvussu tey hava tað, og hvat tey kundu hugsað sær var øðrvísi í kommununi**

BØRN OG UNG
*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin*

Í gjárkvøldið varð skipað fyri lítlum hátíðarhaldi á Margarinfabrikkini í Havn, har eitt nýtt álit um ung í Tórshavnar kommunu varð handað Tórshavnar Býráð. Næmingar á tónleikabreytini í Tórshavnar kommunuskúla spældu rokkkendan tónleik, og tríggjar ungar gentur sýndu síni dansikynstur.

Fyri skjótt fýra árum síðani tók býráðið stig til at seta ein arbeiðsbólk at lýsa viðurskiftini hjá børnum og ungum í Tórshavnar kommunu, og í gjár kundu so Heðin Mortensen, borgarstjóri, og Hildur Eyðunsdóttir, forkvinna í mentamálanevndini, taka ímóti hesum áliti.

Í arbeiðsbólkinum hava sitið Bogi Andreassen fyri Margarinfabrikkina, Elin Heðinsdóttir Joensen fyri Barnaverndina, Jákup Fjallsbak fyri Føroya Ungdómsráð, Katrin Petersen fyri Trivnaðardeildina hjá Býraðnum og Rigmor Dam, sum hevur verið skrivari.

Uppgávan hjá bólkinum hevur verið at gera niðurstøður og tilmæli, ið kann vera vegleiðandi fyri at fremja eina virkna barna- og ungdómsmentan, sum tað verður sagt, og fyribyrgja mistrivnaði.

**Helmingurin svaraði**

Sjálvt álitið er grundað á samrøður við fólk og feløg, sum á einhvønn hátt hava tilknýti til ung fólk í Tórshavnar kommunu. Harafturat eru úrslit frá eini ungdómsráð-stevnu á Háskúlanum og ein spurnarkanning um trivnaði, nýtslu og tilmæli hjá næmingum í framhaldsdeildini brúkt sum grundarlag undir álitinum.

Hóast álitið er rúgvusmikið og niðurstøðurnar og tilmælini eru nógv í tali, er álitið væl uppsett og skrivað á løttum máli. Ikki minst er vert at geva gætur, at talumálið hjá teimum ungu er tikið við, og orð sum kul, at hanga út og babyrokkarar eru at síggja.



*"Dansigentur og ein tónleikabólkur undirhildu á samkomuni íMargarinfabrikkini*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Í fjør sendi Mentamáladeildin hjá Tórshavnar Kommunu teldubrøv til allar næmingar í framhaldsdeildunum í kommuni, har tey kundu svara upp á spurningar, um t.d. hvussu tey brúktu frítíðina, um tey hildu tørv vera á fleiri frítíðartilboðum til tey ungu, og um tey roykta ella nýttu rúsdrekka og onnur rúsevni.

Ein góður helmingur ella 56 % av næmingunum svaraðu spurningunum, tvs. 499 ungfólk í aldrinum 13 til 17 ár.

Niels Madsen, cand. mag. í samfelagsfrøði og heimspeki orðaði spurnarkanningina, og Fróði Jacobsen, stud. scient. soc. gjørdi niðurstøðurnar burtur úr svarunum.

Í løtuni verður eitt líknandi álit fyrireikað av Mentamálaráðnum, sum ætlar at gera eitt álit um, hvussu mentanarpolitikkurin skal skipast, tá talan er um børn og ung.

## 12 % av teimum ungu trívast illa

**Nøkur børn og ung í høvuðsstaðarøkinum kenna seg einsamøll og hava ikki nøkur ítriv. Fleiri av hesum sita í meira enn fimm tímar um dagin við telduna**

BØRN OG UNG
*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*

Í Tórshavnar kommunu eru nakrir avbyrgdir ella marginaliseraðir ungdómsbólkar, sum ikki trívast, verður staðfest í nýggja álitinum. 12 % av teimum ungu siga seg nevniliga ikki hava nakrar vinir, samstundis sum tey hvørki hava nøkur ítriv ella áhugamál. Hesi trívast ikki í skúlanum og koma sjáldan út millum fólk.

Ein lítil bólkur – eini 6 % - spælir við teldu meira enn 5 tímar um dagin. Hetta er eisini við til at gera tey einsamøll, og hesi trívast lutfalsliga verri í skúlanum enn hini. Hetta samsvarar eisini væl við aðrar nýggjar kanningar, ið vísa, at ovurnýtsla av teldum førir við sær, at tey ungu verða sosialt avbyrgd og koma inn í eina ónda ringrás.

13 % av teimum ungu, ið verða roknað sum marginaliserað, svaraðu, at teimum dámdi best at lesa í frítíðini, men lutfalsliga nógv av teimum hyggja nógv í sjónvarp, altso meira enn fimm tímar um dagin.

Bert 15 % av teimum eru limir einum ítróttarfelag.

Til spurningin, um tey so eru virkin í kristnari samkomu, svaraðu 30 %, at tey komu í eina kristna samkomu minst eina ferð um vikuna. Hetta er eitt sindur fleiri enn hjá heildini, har svarið var 27 %.

Annars eru ikki nógv ung, ið dámar sera væl at ganga í skúla, eins og tølini á talvuni vísa. Tey ungu siga, at fremsta orsøkin til, at teimum dámar at ganga í skúla, er, at tey eru saman við floksfeløgunum. Í skúlanum hava tey nógv vinfólk. Nøkur nevna enntá eisini, at teimum dámar væl at nema sær lærdóm í skúlanum. Onnur siga, at tey høvdu kett seg, um tey einki høvdu at fara upp til í gerandisdegnum.

Hinvegin siga fleiri, at teimum ikki dámar undirvísing ella heimaarbeiði, tí tey halda undirvísingina vera keðiliga og lítið spennandi. Fleiri siga enntá, at lærararnir eru vánaligir og gera tímarnar keðiligar. Stutt sagt verður skúlin sagdur at vera ov stirvin.

Álitið staðfestir, at umstøðurnar til fríkorter og matarsteðg eru ov vánaligar. Tú verður mælt til, at skipanin við framhaldsdeildum og 10. flokki verður endurskoðað, og at Tórshavnar Kommuna setir sær nøkur útbúgvingarpoltisk mál fyri framtíðina.

HVAT DÁMAR TÆR AT GANGA Í SKÚLA ?
(8,4 % hava ikki svarað upp á hendan spurning)

| | Øll | Dreingir | Gentur |
|---|---|---|---|
| Mær dámar sera væl | 6,7 | 5,8 | 7,8 |
| Mær dámar væl | 30,5 | 29,1 | 32 |
| Mær dámar toluliga væl | 38,2 | 38,4 | 38,1 |
| Mær dámar als ikki | 16,2 | 20,5 | 11,3 |

## Stórt trýst á Margarinfabrikkina

Í nýggja álitinum um børn og ung hjá Tórshavnar Kommunu verður staðfest, at sum heild trívast tey ungu í kommununi væl og eru virkin í frítíðini. Ofta ganga tey í tveimum bólkum, nevniliga tey sum ballast nakað illa og ganga nógv í býnum, og hini, sum í álitinum verða kallað trúgvandi og ganga á møti og fara á ungdómslegur.

Arbeiðsbólkurin mælir býráðnum til at seta fleiri ungdómshús á stovn, tí trýstið á Margarinfabrikkina í miðbýnum er stórt, og tørvur er á slíkum støðum í útjaðarunum, tvs. á Argjum, í Hoyvík og í Kollafirði.



*Arbeiðsbólkurin, sum hevur skrivað álitið um ung, handaði tad lidna úrslitið hóskvøldið* *Mynd: Álvur Haraldsen*

Í álitinum verður m.a. staðfest, at tilboðini til tey broyttust, eftir at rúsdrekkalógin varð broytt í 1992. Knappliga sluppu tey ungu ikki longur í sama mun í dans ella inn á kaféir, tí eigararanir eru bangnir fyri at missa skeinkiloyvið, um fólk undir 18 ár eru inni hjá teimum.

Hetta setir nýggj krøv til myndugleikarnar, tí ongin hevur áhuga í, at tey ungu ganga úti um náttina - ella upp aftur verri: koyra úti um náttina!

Eisini verður sagt, at tey ungu vilja skapa, og tí eiga fleiri tilboð at vera í skapandi listagreinum. Hesi tilboð kunnu skipast í ungdómshúsunum, so tey eisini verða mentanardeplar og búningarstøðir.

## Í álitinum verður m.a. mælt til:

- Betri umstøður til tónleikavenjingar
- miðvísan ítróttapolitikk
- náttarbussar
- ungdómsráð eins og eldraráð
- baðiland
- skoytubana
- listaskúla
- ungdómsráðgeving
- SSP-ráðgeving millum skúla, sosialar myndugleikar og politi betri alla aðrar hølisumstøður til Margarinfabrikkin